FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
The Faroe Islands Fisheries Inspection



# 1. STÝRIMAÐUR TIL FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ

Eitt starv sum 1. stýrimaður við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, til setan skjótast gjørligt.

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávir**
- Ganga vakt eftir vaktarskipan, sum skiparin fyriskipar.
- Luttaka í dagliga arbeiðinum.
- Arbeiðsuppgávur sambært starvslýsing í Góðsku- og tyrgdarhondbókini.
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv**
- Útbúgving sum skipsførari.
- Vinnubrævsum stýrimaður við handilsskipum á 3. stigi (STCW-regl. II/1 as Watchkeeping Officer).
- Heilsuváttan fyri sjómenn.
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlenskum og enskum máli.
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa.
- Prógv, so sum frc, eldsløkking, fyrstuhjálp, vinnukavari og onnur ið eru viðkomandi fyri starvið. Fyrimunur er við gildugum prógvum.
- Aldur og heilsu til at gerast vinnukavari. Fyrimunir men ikki krav.

**Setanartreytir**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið. Starvsheiti er 1. stýrimaður.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn við: CV, avrit av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 12. november 2007 klokkan 14.00.

**Umsóknirnar skulu sendast til**

**Fiskiveiðieftirlitið**
Postsmoga 347
110 Tórshavn
att: Jóannes Heimustovu

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 311065 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.
Henda lýsing er eisini á heimasíðuni www.fisk.fo.

www.fisk.fo



# YVIRSTÝRIMAÐUR TIL NORRÖNU

## Vilt tú verða í fyrstu røð í føroyskari skipa- og ferðavinnu?

Pf Smyril Line søkir eftir yvir stýrimanni til Norrönu. Vit bjóða tær eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Pf Smyril Line.

Títt komandi arbeiðspláss er eitt av størstu, bestu og nýggjastu ferðamannaskipum á Norðuratlantshavinum, og samstundis størsta skip føroyingar eiga. Hon tekur 1482 ferðafólk, 800 bilar og manningin, tá hon er mest, telur heili 118 fólk. Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

Smyril Line leggur stóran dent á at hava so gott starvsfólkatilfeingi sum gjørligt og at skapa so góðar karrierumøguleikar sum gjørligt. Tískil er tað ein treyt, at umsøkjarin hevur skipsstjórapotentiali og kann virka sum avloysaraskipari á Norrönu.

**Førleikakrøv:**
- Vinnubrævsum skipsførari á 1. stig.
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvs- og leiðaraevni.
- Øll kravd og neyðug skeið og prógv.
- Leiðsluroyndir umframt góð búskaparlig og analytisk evni.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir frá ferðamannaskip um áður, men hetta er eingin treyt.

**Lønarviðurskifti og setanartreytir**
Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Skipara- og Navigatørfelagið og Reiðarafelagið. Umframt sáttmálalønina verður serligt ískoyti latið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

**PF SMYRIL LINE**
Att. Andras Róin, stjóri
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn
ar@smyril-line.fo

Umsøknir skulu verða okkum í hendi **í seinasta lagi 9. november 2007.**

Nærri kunning um starvið kunnu fáast við at venda sær til Andras Róin, stjóra, á tlf. 345900.

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyar, Ísland, Noreg, Danmark og Týsklandi, umframt samstarvsfelagar í nógvum øðrum londum.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM